tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Hvar bleiv breiða semjan av

## *Oddagrein*

LÍKA síðani spurningurin um fullveldi kom fram í dagsins ljós hevur løgmaður havt eina greiða linju: hann hevur ikki viljað úttalað seg konsekvent um málið men hevur brúkt sera diplomatiskar vendingar. Áðrenn Hvítbókin kom vísti løgmaður á, at hann fór ikki at siga nakað um málið, fyrr enn Hvítbókin fyrilá. Síðani kom Hvítbókin, men løgmaður var framvegis fáorðaður. Hann vísti til, at tað ráddi um ikki at fastlæsa støðuna. Vending løgmans „Breið semja" gjørdist til eitt hugtak. Og ein eigur kann eisini væl skilja løgmann, at hann hevur roynt at vera varin í hesum máli, tí tað er og verður hansara uppgáva at fáa ymsu sjónarmiðini sjóvað saman. Løgmaður hevur gjørt púra greitt, at hann fer ikki til Danmarkar at samráðast, um hann ikki frammanundan hevur fingið váttan frá flokkunum á tingi um, at talan er um eina breiða semju í málinum. Hetta merkir í veruleikanum, at løgmaður í hvussu er má hava Javnaðarflokkin við í eina semju. Her hevur løgmaður fingið at vita ferð eftir ferð frá formanni Javnaðarfloksins, at ein breið semja má vera innan fyri Ríkisfelagsskapin, nakað, sum Tjóðveldisflokkurin ikki vil hoyra talan um.

SPURNINGUR okkara til løgmann er: hvar bleiv tann breiða semjan av, sum m.a. tú skuldi rudda slóð fyri? Eru royndirnar miseydnaðar og er tað orsøkin til, at málið nú verður latið upp í hendurnar á Uttanlandsnevndini, har Tjóðveldisflokkurin eigur formannin? Um so er, at tað er rætt, sum er komið fram, at uppskotið landsstýrið fer í Uttanlandsnevndina við, avmarkar seg til at vera upprunaliga ætlanin hjá Tjóðveldisflokkinum, so má sigast, at løgmaður hevur givið skarvin yvir sum semingsmaður.

SPURNINGURIN í dag er kanska eisini tann, hvussu landsstýrið - fyri at fáa eina breiða semju - fær Javnaðarflokkin við. Kann tað hugsast, at løgmaður hevur innsæð, at tað er neyðugt at taka Javnaðarflokkin við í landsstýrið fyri har at tvinga hann til at vera við til at taka eina avgerð í hesum álvarsmáli. Og er tað so, at ónøgdin við leiklutin hjá Sjálvstýrisflokkinum í pensións- og sjúkrahúsmálinum er so stór, at løgmaður rætt og slætt ger av at skifta út Sjálvstýrisflokkin við Javnaðarflokkin? Rumbuli í hesum málum hevur avgjørt skatt fullveldissakina. Men kanska er upphavsmaðurin til hetta í veruleikanum fíggjarmálaráðharrin, sum vit sínum stívrenda fíggjarpolitikki hevur rakt við eitt sera eymt punkt hjá veljarunum.

***Sosialurin***

# Krevur at fáa sannleikan fram

*Jákup Mørkøre hevur sett løgmanni krav um kanna leiklutin hjá Almanna- og Heilsumálastýrinum í sambandi við, at hann fyri viku síðani varð sagdur úr starvi sum sjúkrahúsleiðari*

John Johannessen

– Við hesum fari eg at heita á løgmann, um at veita mær ta sømd at kanna leiklutin hjá Almanna- og Heislumálastýrinum í málinum, sum førdi til, at eg varð sagdur úr starvi sum leiðari av Landssjúkrahúsinum.

Fyrrverandi sjúkrahúsleiðarin, Jákup Mørkøre, sendi sunnudagin løgmanni bræv, har hann krevur at fáa málið um uppsøgnina av sær kannað.

Jákup Mørkøre metir seg nevniliga einki skeivt hava gjørt í sambandi við sparingarnar á Landssjúkrahúsinum, og tí metir hann uppsøgnina ógrundaða.

– Tann órættur, sum her er gjørdur móti mær, verður óivað skjótt gloymdur, men fyri tey, sum kenna sannleikan í málinum, er hetta við at máa støðið undan trúgv teirra uppá, at rættvísi valdar í føroysku umsitingini.

– Eg havi ta tiltrúgv til tygum, sum stjórnarleiðara, at tygum vilja kanna málið, sigur Jákup Mørkøre og vísir á, at hann einki hevur at missa við, at sannleikin kemur fram allur sum hann er, og tí hevur hann loyvt sær at senda fjølmiðlunum avrit av brævinum.

Jákup Mørkøre sigur málið um uppsøgn hansara vera púra greitt fyri honum. Hann vísir á, at hann setti lønarsparingar í verk eftir beinleiðis boðum úr Almanna- og Heilsumálastýrinum, og at Almanna- og Heilsumálastýrið var í øllum smálutum vitandi um, hvat skuldi fara fram, áðrenn nakað varð sett í verk.

Orsøkina til, at Jákup Mørkøre nú heitir á løgmann um at kanna málið, sigur hann vera, at løgmaður undan uppsøgnini segði við Internetsosialin, at málið um uppsagnirnar á Landssjúkrahúsinum átti at fáa avleiðingar fyri ráðharran ella stovnsleiðaran.

– Við tað, at málið endaði við at fáa avleiðingar fyri meg, eri eg komin til ta niðurstøðu, at Almanna- og Heilsumálastýrið ikki kann hava greitt løgmanni frá, hvussu leiklutur tess hevur verið í hesum máli.

Við í brævinum til løgmans hevur Jákup Mørkøre eisini sent frágreiðingina, hann skrivaði um málið, eftir at hava lisið samrøðuna



við løgmann í Internetsosialinum sunnudagin áðrenn uppsøgnina. í hesi frágreiðing greiðir Jákup Mørkøre frá, at hann allatíðina hevur kunnað aðalstjóran í Almanna- og Heilsumálastýrinum um avleiðingarnar, sparingarnar á Landssjúkrahúsinum fóru at hava við sær.

Í frágreiðingini skrivar Jákup Mørkøre eisini, at hann fleiri ferðir bað um fund við landsstýriskvinnuna, so hon kundi verða kunnað um málið, men fekk at vita frá aðalstjóranum, at landsstýriskvinnan var fult kunnað um málið, og tískil var ikki neyðugt við fundi millum sjúkrahúsleiðaran og landsstýriskvinnuna.

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum sigur tó, at hon aldri varð kunnað um, at talan var um 27 uppsagnir á Landssjúkrahúsinum. Annars hava hvørki Helena Dam á Neystabø ella Høgni Joensen higartil vilja gjørt aðrar viðmerkingar til málið. Tey hava nevniliga mett málið sum eitt persónsmál.

Hvat nú hendir í málinum, eftir brævið frá Jákupi Mørkøre til løgmans, er ilt at siga, men greiðar ábendingar eru um, at útmeldingarnar hjá onkrum av pørtunum ikki eru sannar.

Tað eydnaðist tíverri ikki at fáa fatur á løgmanni áðrenn blaðið fór til prentingar.

# Mugu blása lív í Norðurlendska samstarvið

*– áðrenn tað brotnar av um tvøran*

Mikukvøldið klokkan 19:30 skipar Norrønafelagið í Føroyum fyri almennum fyrilestri í Losjuni á Tinghúsvegi 18 í Havn. Høgni Hoydal, landsstýrismaður í norðurlandamálum, fer at halda fyrilestur umnorrønt samstarv.

Norðurlandaráðið verður ofta skírt ein »kaffiklubbur«, har nógv verður tosað, men lítið kemur á skaftið. Men norðurlendskt samstarv hevur ávirkan á nógv fleiri økjum, enn vit geva okkum far um. Stórar broytingar eru tó hendar og fara at henda í norðurlendksum samstarvi. Gongdin í ES, í Baltalondum og Russlandi tykist at fáa alt størri pláss í politiska huganum hjá teimum størru Norðurlondunum. Samstundis eru tekin um, at Útnorðursamstarvið millum Ísland, Grønland og Føroyar veksur, og Norrønt Atlantssamstarv, har Strandanoreg samstarvar við londini í útnorði, tykist eisini at styrkna.

Vandi er fyri at norðurlendsk samstarv brotnar av um tvøran, har ES-londini draga ein veg, meðan útnorðurlondini draga annan veg. Tí er neyðugt at útnorðurlondini geva norðurlendska samstarvinum eina saltvatnsinnspræning, og har eiga Føroyar at ganga á odda. At Føroyar stevna móti fullveldi fer eisini at geva Føroyum møguleika fyri sjálvstøðugum limaskapi í Norðurlandaráðnum, og harvið eisini nýggjari ábyrgd og ávirkan.

Í fyrilestrinum greiðir landsstýrismaðurin í norðurlandamálum frá søguligu gongdini, og hvørji stig verða tikin í landsstýrinum til at styrkja samstarvið frameftir og geva Føroyum ein størri og sjálvstøðugan leiklut í norðurlendskum samstarvi.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá góði bróður okkara

**HERMAN JACOBSEN**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vóru um hann í sambýlinum og á Landssjúkrahúsinum. Tøkk til Berg D. Joensen, prest. Tøkk til tykkum sum vóru í kapellinum og tykkum sum fylgdu. Tøkk til sangarar, berarar og gravarar. Tøkk fyri blómur og kransar.

Eina serliga tøkk senda vit Asfríð og Kirstin.

**Daniel Johan og Hilmar Jacobsen**
**Víkarbyrgi**



# Olofson flytir til Klaksvíkar

*Peter O. K. Olofson er vælkomin í Christianskirkjuna at prædika, siga sóknarprestarnir í Klaksvík*

Eyðun Klakstein

Umstríddi presturin, Peter O. K. Olofson, flytir til Klaksvíkar, tá hann fer úr starvinum í Fuglafirði 1. mars.

Og tað er einki í vegin fyri, at hann kann prædika í Christianskirkjuni, siga sóknarprestarnir í Klaksvík, sum hava verið millum stuðlarnar hjá Olofson í kirkjustríðnum.

Peter O. K. Olofsson váttar fyri Sosialinum, at hann flytir til Klaksvíkar 1. mars, men hann veit lítið at siga um, hvat hann fer at takast við har.

– Orsøkin til at eg og familjan flyta til Klaksvíkar er, at vit hava fingið eina íbúð har. Eg dugi ikki at siga, hvat eg fari at gera eftir 1. mars, tí tað er eingin avgerð tikin um tað, sigur Olofson.

– Eg eri trúgvandi fyri tað, um eg flyti til Klaksvíkar, men hvør mín leiklutur verður har, veit eg einki um, sigur hann.

*Hava tú og familjan umhugsað at flyta av landinum?*

– Nei, tað hevur ongantíð rættiliga verið uppi og vent. Føroyar er eitt gott land at búgva í.

### Hurðarnar standa opnar

Sóknarprestarnir í Klaksvík bjóða Olofson at vera vælkomnan til teirra prestagjald.

– Kirkjurnar í prestagjaldinum eru opnar fyri Olofson, sigur Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur.

Starvsfelagin hjá honum, Hans Eiler Hammer, sigur tað sama, og hann heldur einki forða fyri, at Olofson sleppur at prædika í Christianskirkjuni, um hann hevur hug til tað.

– Olofsson hevur ikki mist kragan, hann hevur sjálvur sagt seg úr starvinum, og tí er einki í vegin fyri, at hann kann prædika í Klaksvík, siga sóknarprestarnir í Klaksvík.

– Olofson hevur nógvan kunnleika og er trúgvur ímóti Bíbliuni. Tað ivast vit ikki í, at vit fara at njóta gott av. Hann hevur nógva sálarrøkt, eisini í norðoyggjum, og eisini fólk úr øðrum samkomum leita sær sálarliga hjálp hjá honum.

### Sama leiklut sum onnur

– Olofson fær sama leiklut, sum onnur hava í Christianskirkjuni. Aðrir prestar hava havt havt gudstænastu í Klaksvík, og onkur lesandi eru eisini sloppin fram at. Um hann hevur hug til tað og brúk er fyri honum, sleppur Olofson eisini at hava gudstænastu, sigur Hans Eiler Hammer, sóknarprestur.

Hann heldur eisini, at ein møguleiki er, at lata Olofson hava onkra føstugudstænastu á smærru plássunum í prestagjaldinum.

Niels Pauli Danielsen sigur, at prestarnir í Klaksvík sambært lóg um brúk av kirkjunum kunnu avgera, hvør kann sleppa at halda gudstænastu í Christianskirkjuni.

– Vit hava als einki ímóti, at Olofson kann sleppa fram at, tá brúk er fyri honum, eins og hann er vælkomin í øðrum kirkjum og prestagjøldum í landinum við sínum greiða boðskapi og stóra gudfrøðisliga kunnleika, sigur hann.

### Segði seg úr stravinum

Orsøkin til, at Petur O. K. Olofson segði seg úr starvinum í Fuglafirði, er at finna í kirkjustríðnum, sum leikaði á í fjør.

Alt byrjaði við, at Olofson ikki vildi góðtaka, at bispur loyvdi kvinnuligum presti at prædika í kirkjuni í Fuglafirði, meðan hann var í aðrari kirkju í prestagjaldinum.

Eftir nógv samskifti millum bisp og Olofson endaði tað við, at Olofson kærdi bisp fyri Kirkjumálaráðið. Eftir hetta kom rættilig ferð á hendingarnar, tí fleiri prestar stuðlaðu Olofson í hansara stríði við bisp, og danska Kirkjumálaráðið fekk nógvar kærur úr Føroyum.

Eftir langa viðgerð vísti Kirkjumálaráðið allar kærurnar frá sær, og hetta fekk Olofson at siga seg úr starvinum. Tað hevði hann lovað frammanundan. Olofson segði, at bispur loyvdi ranglæru í kirkjuni, men tað vísti bispur frá sær.

1. mars fer Olofson so úr starvinum í Fuglafirði, og tá leggur hann leiðina um Lorvíksfjørð, til Klaksvíkar, har hann fer at búseta seg.



# Uttan P/F Vágatunnil - einki hol

*- Tað er rætt og slætt ógjørligt at gjøgnumføra Vestmannasuund uttan P/F Vágatunnilin, sigur Finnbogi Arge, landsstýrismaður*

Ólavur í Beiti

Finnbogi Arge, samferðslumálaráðharri, er púra sannførdur og avgørdur, at skulu vit hava ein tunnil undir Vestmannasundi er besta og skjótasta loysnin, at eitt partfelag tekur sær av arbeiðinum.

- Gamli mátin var at játta so hvørt á fíggjarlógini, til arbeiðið einaferð var liðugt, men hesin mátin er ikki nøktandi í dag. Skulu vit hava eitt projekt í hesi støddini so skjótt sum gjørligt liðugt og stýra gongdini neyvari ber ikki til við slíkari játtan, sigur samferðslumálaráðharrin við Internet-Sosialin.

Og víðari sigur Finnbogi Arge, at loft er sett á íløgurnar á fíggjarlógini soleiðis, at løgtingið játtar ikki meir enn 20 mió krónur árliga, so skal hetta projektið gjøgnumførast, má arbeiðið fíggjast uttan um fíggjarlógina, og PF Vágatunnilin taka sær av projektinum.

Samferðslu málaráðharrin leggur afturat, at tað ber ikki til at skilja fíggjarliga partin og ábyrgdina at. Tí hevur PF Vágatunnilin undirskrivað avtalu við Landsverkfrøðingin, at hesin stovnur vegna PF Vágatunnilin tekur sær av útbjóðingini av vegagerðini til og frá tunnlinum, skal hesin stovnur eisini ansa eftir, at normar og standardir, sum eru lýstir, verða fylgdir.

- Og tað er heilt greitt, at verður tað ikki PF Vágatunnilin, sum tekur sær av arbeiðinum, ja so verður eingin tunnil, sigur Finnbogi Arge, samferðsluráðharri avgjørdur.



*Finnbogi Arge, landsstýrismaður í samferðslumálum*

